## Eg meini tað



Rigmor Dam, lærari, skrivar:

# Loysnin er loysing

Tað eru ikki smávegis skálkabrøgd útjaðaranum verður boðin í hesum døgum. Er tað ikki eitt hol, niðanfyri ella omanfyri vatnskorpuna, sum er trupulleikin, so er tað vandin fyri at verða avskorin frá umheiminum, tí peningur ikki er tøkur at røkja skipini um firðirnar í oyggjaríkinum Føroyum. Í løtuni verða 12 fólk í senn í pendulfarti flutt um Vestmannasund, meðan Suðuroyingar als ikki vita, um teir hava fart framyvir. Nú er bert eftir at vóna, at eingin hevur sjúkrahjálp fyri neyðini, tí sum skilst er tað einans av náði og hjartaligari góðheit frá ávísum persónum, at tey bæði smærru sjúkrahúsini standa. Og hvussu bleiv við flogvøllinum? Liggur hann har vesturi?

Enn einaferð gekk sjón fyri søgn um, at miklar maktir, ella skuldi ein sagt høgir harrar, hava sett sær fyri at miðsavna alt virksemi í landinum í miðstaðarøkinum. Hetta hendi nú í vikuni, tá ein stórur meiriluti í løgtinginum atkvøddi ímóti at leggja oljuútgerðarhavn í Suðuroynni, hóast íbúgvarnir á oynni ikki nýtast fjølmiðlarnar sum megafon, fyri at vit her norðanfyri skulu hoyra neyðarópini. Nei, betur er at lata Klondyke-lyndið ráða, har smáøkini framhaldandi kunnu pumpa pening í havnaløg og projekteringar..í heilaga navnið marknaðarkreftunnar.

Í seinasta parti av politisku komediuni, ella skuldi ein sagt tragediuni, upplivdu vit miskunnarleysa frændaveldi, har »meir skal hava meir - moralurin« er stovubærur og øll menniskjalig fyrilit um at hjálpa fólki í neyð og ikki at verða grammur eftir verðini, eru skúgvað til viks. Her var talan um opinskáraða øvund og smáligheit (ja, nú øsi eg meg also!), har fólk, sum hava almikið frammanundan, ikki unnað teimum, sum veruliga treingja, burturav. Og eingin skal billa mær inn, at tað er umhugsni fyri vinnuni, sum fær slíkar pissior-politikarar at agera sum teir gera. Nei, her er einki annað enn nepotisma og lobbyisma sum styrir havisjúkuni, og samstundis lagnuni hjá stórum pørtum av fólkinum.

Er hatta hevnd fyri valúrslitið har suduri? Andstøðan um 64% og samgongan 35%? So mugu tit virkuliga taka tykkum saman suðringar og spjaða atkvøðurnar betur, tit grava tykkara egnu grøv í løtuni!

Ella kanska var lættari at siga, at tíðin er búgvin til loysing frá restini av landinum? Tankarnir hava verið frammi fyrr. So fáa tit næstan alla oljuna fyri tykkum sjálvar og eina rúgvu av fiskigrunnum. Kanska kundu tit eisini varðveitt ríkisfelagsskapin og blokkin úr Danmark, og latið norðingarnar fingið fullveldi? Tad eru tit jú eisini um at forpurra.

»Tit suðringar plaga ikki at klynka« var tad ikki nakad soleidis ein kendur havnamaðir segði herfyri.

Ein sannroynd er tað, at hetta er ein roynd at geva Suðuroynni mønustingin, tí hóast oljuvinnan kanska ikki fór at geva nakað sum helst av sær, so er tað í vónini um betri tíðir, vit menniskju byggja framtíðina og finna viljan til tess.



Mynd: Jens Kristian Vang

**Hon byrjaði sum feriuavloysari. Fekk síðani boðið starv - og seinni varð hon biðin um at taka yvir Reinsaríið hjá Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrikk. 80 ára gamla Maria Olsen hevur nú latið aftur**

# Maria hevur reinsað fyri havnarfólk í 55 ár

HORVIN BÝARMYND. Seinasti parturin av virkseminum hjá Thorshavns Mælkeforsyning og Margareinefabrikk í Tórsgøtu í Havn hvarv, nú Maria Olsen, hevur latið Reinsaríið aftur

*Eirikur Lindenskov*

Tann seinasti tátturin í umfevnandi virkinum, sum var í Tórsgøtu í Havn, í dagligari talu undir heitinum Majaríið, er nú farið í søguna. Nú er einki av tí, sum har var eftir, uttan Vita margarinið, sum nú heldur til úti á Argjum.

Tað er Reinsaríið í Tórsgøtu, sum Maria Olsen hevur rikið einsamøll nú tey nógvu árini, sum nú hevur læst fyri síðstu ferð. Ein lítil seðil á hurðini í Tórsgøtu boðaði frá avgerðini, nú komið varð í nýggja 1000 árið.

Tað var fyri 55 árum síðani, at Maria Olsen úr Vestmanna byrjaði á Reinsarínum.

– Eg kom sum feriuavloysari. Tá tað var liðugt, so fór ein onnur í feriu, og soleiðis helt eg á eina tíð. So vísti tað seg, at ein fór úr starvi, og so varð eg biðin, greiðir Maria Olsen Sosialinum frá.

Tá meiaríið minkaði um virksemið, varð Maria spurd, um hon vildi taka yvir Reinsaríið.

– Eg tók av avbjóðingini, og teir tóku 500 krónur í leigu, sigur hon

Tað er drúgv søga, sum liggur aftan fyri tey mongu virki, sum hava húsast undir lonini í gamla »Hansens pakkhúsi«, sum húsini eina ferð vórðu rópt. Men upprunaliga eru hetta pakkhús hjá Ryberg, seinni Einahandlinum og síðani pakkhús hjá M. C. Restorff, til majarífyritøkan ella A/S Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik keyptu ognina í 1922. Eitt skifti var Sápufabrikk í niðaru hæddini til fabrikkin »Okkara« varð bygd uppi á Hálsi í 1938.

Nú eigur Tórshavnar kommuna ognirnar hjá majarínum.

Tey eldru minnast Vaskaríið í niðaru hædd, Reinsaríið í ovaru og Fjøðurreinsaríið á loftinum.

Nú er so liðugt, tí Maria heldur, at hon nú skal taka sær meira av løttum. Seinast hon skifti árstal, bleiv hon 80 - tað var í mai.

Maria hevur sanniliga verið ágrýtin. Hon hevur eisini havt evnini at endurnýggja virki sítt. Í 70'unum skifti hon út til nýggjar reinsimaskinur, og so gekk tað sum smurt í mong ár.

Maria Olsen hevur nógv gott at bera bæði leiðslu og starvsfólki hjá Thorshavns Mælkeforsýning og Margarinefabrikk.

– Tey vóru øll so ómetaliga fitt og hjartagóð øll somul - og eg havi so nógv gott at bera teimum, sigur Maria.

Tað eru mong, sum hava lagt leiðina inn á Reinsaríið gjøgnum árini við blettutum og rukkutum klæðum, og hava fingið pløggini aftur, snøgg og snotulig, sum bara Maria kundi gera tað. Tað verður nú ein stórur saknur nú Reinsaríið í Tórsgøtu ikki er meira.




**Maria Olsen hevur nú læst hurðina á Reinsarínum fyri seinastu ferð Mynd: Jens Kristian Vang**

**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 19, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Slóðbrótarin

**Portrett.** Kompromisleysur, dugnaligur og krevjandi. Jørgin Dahl er slóðbrótarin í føroyskum rocktónleikur, og nú ger hann comeback í Føroyum



*Eyðun Klakstein*

Hann fekk allar føroyingar upp á gólv. Hann bæð tey koma við, og hann mundi lagt Europa niður, tá hann skrivaði um ólukkuligan kærleika í bestu føroysku balladuni nakrantíð.

Jørgin Dahl.

Kompromisleysur, dugnaligur og krevjandi. Tað eru nøkur av orðunum, sum verða sett á hann, tá teir, sum kenna hann best, greiða frá hansara eginleikum sum tónleikari.

– Hann var krevjandi sum tónleikari, og hann var drívkraftin í teimum bólkunum, har hann var við. Hjá okkum øðrum ráddi tað um at fylgja við og royna at seta okkara fingramerki á tónleikin, sigur Heri Ellingsgaard, sum hevur kent Jørgin síðani barnatíðina. Heri spældi við á fyrstu útgávuna hjá Straight Ahead, men fór síðani burtur úr, tá hann fór til Danmarkar at lesa.

Maðurin, sum sang størsta hittið hjá Jørgeni Dahl, heldur, at Jørgin altíð fekk tað optimala burtur úr bólkunum, hann spældi við í.

– Tað er avgjørt eitt úrslit av arbeiðnum hjá Jørgini, at bólkar sum Straight Ahead og Hjarnar vunnu so nógv fram í 70'unum og 80'unum, sigur Karl Martin Samuelsen sangari í Hjarnum.

Hann sang millum annað *Breaking my heart* hjá Jørgini Dahl, sum mundi givið Hjarnum altjóða gjøgnumbrot eftir eina kapping á Radio Luxembourg. Hesin sangur verður framvegis mettur sum ein av teimum bestu føroysku rocksangunum nakrantíð.

– Jørgin var ein framúr sangskrivari. Ein góður sangur er ein góður sangur, líkamikið hvønn veg tíðin roynir at sníkja seg. Fyri meg er Jørgin Dahl tann størsti í føroyskum rocktónleiki, kanska eisini tí hann var tann fyrsti, sigur Niclas Johannesen, tónleikari og komponistur.

**Avrikini**

Søgan um Jørgin Dahl sum tónleikara byrjar fyri 38 árum síðani í Klaksvík, har tann seks ára gamli Jørgin byrjaði at trýsta á tangentarnar.

Hann lærdi seg sjálvur at spæla orgul, og so skjótt, sum hann og vinmenninir høvdu fingið forsterkara, fóru teir at spæla útikonsertir. Fyrstu ferð Jørgin Dahl spældi alment var í gamla Atlantis Bio. Tá kallaðist bólkurin Artic Fox og millum teir, sum spældu við, var Gekkaverturin Rudolf Joensen. Jørgin var tá 15 ára gamal og var byrjaður at gera tónleik.

Nøkur fá ár seinni fór bólkurin Straight Ahead at taka skap. Bólkarnir Cold Turkey, har Jørgin Dahl spældi við, og Homo Sapiens, har millum annað Archie Black spældi, løgdu saman, og tað sum spurdist burtur úr var Straight Ahead. Hetta var í 1972, og tvey ár seinni gjørdu teir sína fyrstu singleplátu.

Løgini *Komið øll við* og *Upp á gólv* vóru fyrsta veruliga boðið uppá føroyskan rocktónleik. Síðani kom ein singlepláta og ein EP-pláta afturat frá Straight Ahead. Í 1978 kom tiltikna Veðraplátan, sum er ein varði í føroysku rocksøguni, men stutt eftir góvust Straight Ahead at spæla. Tá høvdu teir vunnið sær pláss í upplagsverkinum um danskan rock, og tað var ikki bara í Føroyum, at fólk fylgdu bólkinum úr Klaksvík.

Eftir hetta fór Jørgin Dahl at spæla við í Hjarnum, og hann var sentralur persónur í stórtíðini hjá Hjarnum. Teir góvu eina singleplátu út í 1981, og tvey ár seinni kom LP-plátan *We come for you*. Tá Hjarnar góvust at spæla í 1984, spældi Jørgin Dahl eitt stutt skifti í bólkinum Trast, áðrenn hann flutti til Danmarkar miðskeiðis í 80'unum.

Síðani tá hevur hann verið búsitandi í Danmark, og fyrstu ferð hann aftur letur frætta frá sær við útgávu í Føroyum var í gjár, tá *Lost Pilgrims* kom út. Hetta er fyrsta solo-útgávan hjá Jørgini.

**Øll kláraðu ikki upp við hann**

Higartil hava tónleikaligu avrikini hjá Jørgini verið sermerkt, og ferð eftir ferð hevur hann klárað at skriva sangir, sum hava staðið eftir.

Tað sást eisini aftur, tá tríggir av sangunum hjá Jørgini Dahl vóru endurútgivnir á savnsfløgum í fjør.

Og tað er gjøgnum tónleikin hjá bólkunum Straight Ahead, sum fekk navn eftir einum sangi hjá Jimi Hendrix, og Hjarnum, at Jørgin Dahl hevur fingið sín status í føroyskum tónleiki.

– Straight Ahead vóru mínar hetjur, og teirra tónleikur heldur framvegis tann dagin í dag. Ja, eg hugsi ofta mítt, tá prátað verður um, at føroyskur rockur er betri nú enn nakrantíð. Sjálvur haldi eg, at tú skalt fara sera tíðliga upp um morgunin, um tú vilt røkka støðið, sum Straight Ahead legði longu í 70'unum, heldur Niclas Johannesen.

Tað vóru ikki øll, sum dugdu saman við Jørgini Dahl, tí hann kravdi nógv av teimum, sum hann samstavaði við. Hann kláraði ikki upp við øll, men teir sum hava spælt saman við honum, halda at hetta er ein partur av frágreiðingini um, hví hann avrikaði so nógv.

– Hann var kompromisleysur í sínum arbeiði við tónleiki. Hann visti, hvat hann vildi, og hann kravdi nógv av teimum, hann spældi saman við. Gongur tú aftaná slíkum fólki, so spyrst altíð okkurt burtur úr, heldur Heri Ellingsgaard, sum eitt skifti spældi við í Straight Ahead.

– Tað er als ikki løgið, at Jørgin fekk tann leiklutin í føroyskum rocktónleiki, sum hann fekk. Hann vildi veruliga nakað, og tá vit aðrir fóru burtur av, helt hann fast um tónleikin, sigur Heri.

Karl Martin Samuelsen greiðir frá, at Jørgin Dahl altíð hevði eina ætlan við teimum sangunum, hann hevði gjørt. Hann visti, hvussu teir skuldu spælast, men hann var eisini klárur at lurta, um onkur hevði hugskot til sangirnar hjá honum.

– Hann ætlaði sjálvur at syngja *Breaking my heart,* men eftir at eg hevði sungið sangin eitt kvøldið undir venjing, broytti hann hugsan. Eftir tað skuldi eg syngja hann. Soleiðis var hann. Sjálvt um hann kundi verða avgjørdur, kundi hann eisini broyta hugsan, um hann helt okkurt var betri, sigur Karl Martin Samuelsen.

Í gjár gav Jørgin Dahl aftur tónleik út í Føroyum. Tað eru 16 ár síðani seinastu útgávuna.